# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Matvørumentan og samleiki

Málið, kvæðini og náttúran verður oftani tikið fram, tá tosað verður um okkara serføroyska samleika. Hetta er so eisini partur av tí, sum ger okkum til serstakt fólk, sum fær fremmandafólk at vitja oyggjar okkara og sum skapar fortreytir fyri eini ferðavinnu.

Tað er sjálvandi so nógv annað eisini, sum hoyrir til og skapar okkara samleika. Okkara serføroysku siðir, okkara list ja okkara geografiska plasering sum eitt sandkorn mitt úti í tí velduga Atlantshavi eru alt nakað, sum byggir upp undir henda samleika.

Men oftani síggja vit ikki skógina fyri berum trøum. Og eitt, sum væl kann koma undir hesa málsiping eru okkara serføroysku matvørur og matvørusiðir ella einfalt okkara matmentan. Eins og serstakur tónleikur og list eyðkenna hvørt einstakt land, so gera maturin og matsiðirnir tað eisini. Hetta er eisini tað, sum ferðamaðurin leggur til merkis og fer eftir, tá hann vitjar. Hvat eta tit, hvat eiga tit av matvørum, sum bara finnast júst her eru spurningar, sum fremmandafólk oftani seta.

Ikki fyrr enn hesi seinastu árini hava einstaklingar her á landi roynt at gera almenningin varugan við tað gullnám, sum okkara matmentan í veruleikanum er. Feløg og stovnar hava gjørt sítt til at gera matmentanina meira sjónliga. Matstovan Gourmet, sum tíverri mátti stongja, varð eitt nýbrot og ein roynd at varpa ljós nettupp á henda veruleika. Og undangongumaðurin Mortan ì Hamrabyrgi hevur við sínum ótroyttiliga leikluti eisini roynt at gera føroyingar varugar við tann dýrgrip, sum okkara matmentan fevnir um. Tað var tí eisini eitt herðaklapp til bæði hansara og til matmentanarhugtakið sum heild, tá Ársins Átak fór til júst Matvørufestivalin, sum Mortan skipaði fyri.

Herfyri fór so Hotel Føroyar undir eitt tiltak, sum nettupp setur fokus á okkara serføroysku matvørur. Ein kann kalla tað "FM í skerpikjøti" um ein vil. Júst í dag situr eitt stórt panel á hotellinum og smakkar turt kjøt frá 7 ymsum føroyskum bóndrum. Og í annaðkvøld skal so fólkið tala, tá 200 gestir skulu royna skerpikjøtið og vera dómarar. Eitt frískt og frálíkt tiltak, sum er við til at varpa ljóð á hetta okkara so týðandi tilfeingis og mentanarliga gullnám, føroyska matin.

Nú frætta vit so eisini, at útbúgving og skeið innan matvøruøkið skulu raðfestast hægri í útbúgvingarskipanini. Alt hetta er bara at fegnast um, tí her er veruliga nakað, sum ikki bert kann vera við til at gera okkum meira spennandi og forkunnug sum ferðamannaland, men har eisini føroyingar sjálvir kunnu fáa eyguni upp fyri tí serføroyska tilfeingi, ið bara finst her. Sum vit harvið kunnu bera víðari til komandi ættarlið men sum vit eisini – um vit eru meira miðvís – kunnu fáa nógv meira burtur úr við nýhugsan og nýroyndum, nakað, sum eitt nú Gourmetverkætlanin og seinast Matfestivalurin royndu at seta út í kortið. Latið okkum øll taka eitt tak fyri matmentan okkara og ikki minst rætta undangongufólkunum eina hjálpandi hond.

**Sosialurin**

# Miðfyrisitingin í kjakmeldrinum

JÓANNES EIDESGAARD



**Sum ein beinleiðis avleiðing av, at neyðugt er at halda aftur í almennu útreiðslunum, verður nú dag og dagliga mælt til at skerja talið av aðalráðum. Onkur sigur fýra, annar sigur seks og ein triði sjey. Eisini er onkur so frammalaga, at nøvn verða sett á, hvørji ráð skulu niðurleggjast. Hetta eru í ein ávísan mun leysar ballónir, tí millum mangar føroyingar verður hildið, at er tað eitt stað, har sparast kann, so er tað hjá tí almenna. Men innast inni er hetta eisini ein ásannan av, at vit ongantíð komu heilt upp á pláss við miðfyrisitingini eftir stóru kollveltingina hjá Edmund Joensen, táverandi løgmanni og Finn Normann-Christensen miðskeiðis í 90´unum. Men hvat er so frægast nú at gera?**

Vit vóru rættiliga mong, sum longu aftur í 1996 sóu, at leisturin hjá Normann-Christensen fór ongantíð at gerast tann heilt rætta miðfyrisitingin, sum kom at hóska til okkara lítla land. Leisturin hjá Normann-Christensen var jú eitt neyvt avrit av einari stórari og tungari danskari skipan. Fleiri spurdi eisini tá, um ein skipan til 5 mió. fólk var tann rætta til 50 tús. fólk? Vit vóru mong, eisini leiðandi fólk í fyrisitingini, sum dugdu at síggja, at hetta fór at gerast ein skipan, sum kom at kosta okkara lítla landi alt ov nógv. Hetta hevur so eftirtíðin í ríkiligan mát prógvað.

Javnaðarflokkurin fór úr tí samgonguni, tí leisturin hjá Normann-Christensen skuldi gjøgnumførast "no matter what". Fólkaflokkurin tók yvir í juni 1996, og hevur hesin flokkur síðan verið sera virkin partur í at økja og dýrka miðfyrisitingina.

Men nú 14 ár seinni eru vit komin hartil, at sjálvt Edmund Joensen og eisini onnur úr Sambandsflokkinum og enntá onkur úr Fólkaflokkinum mæla til broytingar. Nakað er hóast alt í danska orðatakinum "Af skade bliver man klog, men sjældent rig."

Vit í Javnaðarflokkinum heilsa øllum hesum uppskotum vælkomnum. Vit fóru til val í 2004 við boðskapinum um seks aðalráð. Tá vóru eisini níggju aðalráð. Hetta var seinasta fullveldislandsstýrið hjá Anfinn Kallsberg. Saman við serliga Sambandsflokkinum, sum eisini tók undir við seks aðalráðum, fingu vit hálað tað niður til sjey, men longur niður vildi Fólkaflokkurin ikki fara.

Nú er so spurningurin, hvat kann lata seg gera?

Er tað realistiskt her mitt í einum valskeiði at tosa um eina nýggja kollvelting av miðfyrisitigini. Ein slík hevur jú djúpar avleiðingar fyri tey fólk, sum starvast í miðfyrisitingini, og tí krevst, at eitt slíkt tiltak verður væl fyrireikað. Neyðugt er tí at leita upp allar óhepnar avleiðingar, soleiðis at bindast kann fyri tí ringasta.

Tí vil eg heldur mæla til, at vit fremja nakrar eyðsýndar sparingar í miðfyrisitingini her og nú. Og her hava vit nøkur boð.

Síðan vil eg mæla til, at nú flestallir flokkar melda út um skerjing av aðalráðum, at vit taka hvønn annan upp á orðið og skerja talið av aðalráðum eftir komandi løgtingsval. Vilja flokkarnir hava seks aðalráð, og tað haldi eg er eitt hóskandi tal, so lat okkum gera tað av longu nú. So eiga vit at seta eina nevnd av skilagóðum fólkum til at gera okkum eitt upplegg, sum kann liggja klárt, tá vit koma hartil. Eina nevnd, sum skal gera tilmæli um, hvørji ráð skulu burtur og hvørji ikki, og hvussu bygnaðurin annars skal verða. Í hesari nevnd nyttar lítið bert at seta fólk, sum tóku Normann-Christensen til sín av heilum hjarta. Her mugu eisini skeptikarar sleppa framat.

Tá tað snýr seg um sjálvan bygnaðin, er ein hópur at endavenda. Er tað rætt at hava deildir, har stjórin er einsamallur til arbeiðis, um einasta starvsfólkið er skjúkrameldað. Er tað rætt, at eitt ráð ikki kann virka, uttan at man fløkist í deildum og deildarstjórum.

Eg hugsi eisini her um teir tankar, sum m.o. Annita á Fríðriksmørk hevur verið frammi við mangan um at fáa sterkari tvørráðsligar eindir av t.d. løgfrøðingum og búskaparfrøðingum. Hetta er avgjørt nakað, sum neyðugt er at taka við, tí vit vita nú av royndum, at verandi skipan, har alt verður tægað sundur í níggju smá og størri kongaríki, ikki virkar nóg væl.

Í samband við, at Løgmansskrivstovan nú søkir eftir enn einum aðalstjóra í lønarflokki 39, áttu vit heldur at steðgað á. Vit hava sum er níggju aðalstjórar og einar fimm fyrrverandi aðalstjórar, sum enn sita við somu løn frá tí almenna. Um vit eftir komandi løgtingsval megna at fáa talið av aðalráðum niður á seks, so fáa vit tríggjar aðalstjórar í avlopi. Tá verða fleiri fyrrverandi enn núverandi aðalstjórar. Hví so ikki bíða við at seta fleiri aðalstjórar beint nú?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.